UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **19. november 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-47**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-081/2021 frá Ingilín Strøm, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni, eftir § 52a í Tingskipanini. Fyrispurningurin er um tilmæli um koppseting og sóttarhald.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin koppsett seg fyri koronuvirus til tess at røkja sítt arbeiði sum landsstýrismaður í uttanríkismálum?
2. Hevur landsstýrismaðurin verið í einum brúdleypi, har tíggjutals fólk seinni eru testað positiv fyri koronu?
3. Um landsstýrismaðurin ikki er koppsettur og hevur verið í einum brúdleypi, har tíggjutals fólk eru testað positiv fyri koronu, hevur landsstýrismaðurin so aftaná verið í sóttarhaldi?

Svar

Til 1: Ásett er í § 52 a, stykki 1 í tingskipanini, at tingmenn kunnu seta løgmanni og landsstýrismonnum skrivligar spurningar um **almenn viðurskifti**. Hvørvítt persónur, sum til eina og hvørja tíð røkir landsstýrissess, er koppsettur ella tekur ávísan heiligvág e.l., hoyrir ikki undir almenn viðurskifti. Her er talan um persónlig (heilsu)viðurskifti hjá landsstýrismanninum.

Til 2:. Sama er at siga um spurning 2., har spurt verður um, hvørt landsstýrismaðurin - sum privatpersónur - hevur verið í ávísum brúdleypi. Her er somuleiðis talan um viðurskifti, sum hoyra privatlívinum til og harvið ikki snúgva seg um almenn viðurskifti, sum ásett er í tingskipanini.

Til 3: Triði spurningurin er bygdur á báðir teir fyrru fyrispurningarnar, hvørs grundarlag, - sum víst er á í svarunum omanfyri, – ikki koma undir treytina um almenn viðurskifti. Av tí sama er einki grundarlag til staðar fyri svari til henda spurning.

Leggjast kann afturat svarinum, at aftanfyri spurningar spyrjarans, í besta føri, eisini goymir seg tann misskiljing, at koppseting er ein fyritreyt fyri at røkja týdningarmiklu embætini sum landsstýrisfólk. So er ikki – hvørki sambært stýrisskipanarlóg ella aðrari yvirskipaðari lóg.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður